


*– Vit hava altíð rocktónleik frá, tá vit eru heima. Eisini hart frá viðhvørt. Børnini elska tað og spæla gjarna við á barnaljóðførum, fortelja tey bæði Mikkjal G. Hansen, forsangari í SIC, og Rannvá Símonsen, sjúkrarøktarfrøðingur á Føðideildini á Landssjúkrahúsinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Sum sagt hava Mikkjal og Rannvá fleiri piercingar og tatoveringar. Og tey vilja gjarna hava fleiri.

Eru tey ikki bangin fyri, at fáa ljót arr, tá tey gerast eldri og kanska hava hug at skifta stíl?

– Nei, als ikki. Vit broytast neyvan so nógv. Og fáa vit nøkur smá arr, vekja tey bert góð minni um ein stuttligan ungdóm við nógvum góðum upplivinum, siga tey bæði.

**Tolnar mammur**

Men hvussu hava foreldrini tikið tað, at Mikkjal og Rannvá síggja øðrvísi út?

– Uttan at spyrja mammu litaði eg hárið grønt, tá eg var 12 ár. Tá var mamma vónbrotin. Ikki tí eg hevði litað hárið, men tí eg ikki hevði spurt hana fyrst, fortelur Rannvá. Men tá hon var 14 ár, fekk hon sína fyrstu piercing eftir avtalu við mammuna.

– Mamma hevur altíð stuðlað mær. Tá eg var ung, vildi hon hava, at eg var opin og erlig móti henni. So vísti hon mær álit og eg virdi mørkini, sum hon setti.

Tað var eitt sindur øðrvísi við Mikkjal, sum var nakað villari enn Rannvá í ungu døgunum.

– Eg skikkaði mær illa og havi altíð verið ein øgiligur provokatørur, sigur hann. Og hann forklárar, at 90'ini vóru onki stuttlig at vera teenagari í, og at teir runnu í hølunum á "grønjakkunum".

Tí tók tað nógv ár hjá mammu hansara at venja seg við, at Mikkjal var, sum hann var.

Men í dag verjir mamman hann altíð.

– Mikkjal er ikki so villur innan sum uttan, sigur mamma viðhvørt. Og Rannvá skoytir uppí:

– Tá fólk læra hann at kenna, siga tey: Mikkjal, tú ert ordiliga friðarligur og fittur. Slett ikki so villur, sum tú sært út at vera!

Men tað er kanska ikki so løgið, at fyrsta fatanin er eitt sindur skeiklað, heldur Mikkjal, ið sum tónleikari hevur gjørt nógv púra svakt á pallinum. Og hann heldur, at fólk kanska hava ilt við at skilja millum pallframførslur og gerandisdag.

– Á pallinum er tað bara show. Tað mugu fólk skilja. Eg havi staðið nakin og sløkt siggarettir í skallan á mær sjálvum á pallinum.  So tað er kanska ikki so løgið, at fólk halda meg vera ein lallandi psykopat, sigur Mikkjal og flennir.

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*